TELDU-
DREYMAR?
GER OLIVETTI KVETTI!
Aldri hava tilboðini verið betur og tilhoyrið meiri...hyggið bert her!
OLIVETTI
PCS 5130
-PENTIUM 100Mhz
-850Mb Harðdisk
-14" litskerm
-Mús og knappaborð
-Wind. 95 og Works 4.0
-CorelDraw
-Fax-modem
-Ljóðkort
-CD rom
Við 8Mb RAM
13.200,-
V/ MVG
OLIVETTI
PCS 5140
-PENTIUM 133Mhz
-1,2 Gb Harðdisk
-14" litskerm
-Mús og knappaborð
-Wind. 95 og Works 4.0
-CorelDraw
-Fax-modem
-Ljóðkort
-CD rom
Við 8Mb RAM
15.800,-
V/ MVG
8Mb RAM eyka 620,- V/ MVG
COM-DATA P/F
TORSHAVN. Tlf 16173
KLAKSVIK. Tlf 56173
GLYVRAR. Tlf 49840

Kyrringarfundur í Sambandsflokkinum

Sverrri Midjord skrivar:

Undir yvirskriftini »Sambandsrøddur« fyri leygardagin 31/8 hevur ein undir dulnevni í Dimmalætting nr. 135, eina grein stílað til mín. Yvirskriftin er væl passandi til støðuna í sambandsflokkinum. »Ósemjur«. Viðkomandi leggur ikki navn til, og tað er væl skiljandi, tí ta talan er um ósemjur, so er tað rætt at javnaðarflokkurin hevur tvey feløg á Tvøroyri, og tað er orsakað av innanhýsis ósemju, men bæði feløgini stuðla flokkin til løgtingsvalini.

Men lokalt hevur tað kostað okkum nógv, og enn eru vit ikki komin á botn, tað er prísurin fyri flokksósemjur.

Ju, vit hava ósemjur og hava sanniliga goldið tann prísin, sum tað kostar. Men tað er ein stórur munur á okkara ósemjum, sum eru innanhýsis, og tað sum nú fer fram sambært skrivingini ímillum Jákup Joensen og Atla Hansen. Her er opið kríggj.

Tað er eisini rætt, at eg havi besøtt havt løgtingssessin til láns, men tað skuldi ikki forðað mær at hava mína hugsan um tann førda politikkin.

Og tað er heldur einki dulsmál, at eg frá flokki mínum havi fingið átalu fyri tað, sum eg havi skrivað, men tað fer ikki at føra til opið stríð, soleiðis sum tað sum fer fram í sambandsflokkinum.

Men sjálvandi er tað ein munur, hvat ein, sum hevði tingsessin til láns og nú er vanligur limur, og tað at teir sambandstinglimir, sum fyri at brúka tykkara egnu orð, hava tinglimasessirnar til láns, tá teir stinga høvdini saman, sum Jákup tekur til, og tryggja sær teir tyngstu sessirnar í Løgtinginum og seta tann valda tinglimin úr Suðuroy heilt uttanfyri.

Og sjálvt um formaður sambandsfloksins, verandi løgmaður, fleiri ferðir hevur mælt flokkinum til at velja Jákup Joensen, bæði til landsstýri og til formann í fíggjarnevndini, men hetta hava teir við lantum sessum forðað.

Tann seinasta greinin hjá Jákupi Joensen endar við, at hann biður sterka mannin í sambandsflokkinum, hann sum hevur lánt sessin frá Løgmanni, Atla Hansen, um kyrringarfund.

Ein almenn bøn um at leggja niður teir brotasjógvar, sum eru við at forkoma tryggu sambandsskútuni. Men eru tað nú bert teir valdu sum eru ósamdir. Hvussu eru viðurskiftini við sambandsfelagið í Norðuroyggjum, eru teir nøgdir, var tað ikki nakað um, at teir sendu tann stuðul teir fingu frá flokkinum, aftur til flokkin. Tað nyttist ikki mær, sum støðan er, at finnast at sambandsflokkinum. Teir hava stórar trupulleikar í veruleikanum harmist eg teir, tí hetta er bara byrjanin til eina konfrontation, sum enn ikki er komin í hæddina.

Var tað ikki júst formaðurin í Suðuroyar Sambandsfelag sum segði, at Finnbogi Arge hevði trokað tinglimin úr Suðuroy úr fíggjarnevndini, og nú aftaná at teir hava kjølhalað Finnboga, er hann komin innanborða aftur, meðan tinglimurin Jákup Joensen er heilt uttan nakra ávirkan. Ein løgin flokkur, ein løgin politikkur.

Tað verður í hvussu so er tortført hjá sambandsflokkinum í Suðuroy at sannføra sínar veljarar. »Eg valdi sambandsflokkin fyri at fáa ávirkan« segði Jákup Joensen undir valstríðnum. Hann bleiv valdur, men hann er settur heilt uttanfyri alla ávirkan, ikki tí at hann ikki var huglvin til bæði landsstýrissess ella formanssess í fíggjarnevndini, tí tað er hann. Ein maður sum hevur verið ein av okkara fremstu vinnulívsmonnum, og hetta hevur eisini kostað honum nógv, men tað telur ikki í sambandsflokkinum.

Sambandsflokkurin skal fáa frið fyri mær, tí teir hava tvaleyst at takast við í teirra innanhýsis stríði, sambært tað sum higartil er komið fram alment.

Vit hava innanhýsis trupulleikar, og tað er ikki gott fyri nakran flokk, men her er stríðið mest at líkna við opið kríggj.

Og tað er ikki bara stríðið um nevndarsessir, men tann støðan sum formaðurin í rættarnevndini hevur tikið viðvíkjandi eygleiðaranum í bankamálinum, sigur okkum at her er nakað heilt galið. Formaðurin í rættarnevndini var ein av teimum, sum legði navn til nýggju stýrisskipanarlógina, sum skuldi tryggja andstøðuni rættin til innlit og ávirkan. Nú sigur hann, at tað hevur onga meining at skifta annað eftirlitsfólkið út, so at andstøðan fær innlit.

Tað nyttist ikki mær at gera størri atfinningar at sambandsflokkinum, tí tað duga teir betur sjálvir, tí har er kríggj.

Og tað er væl skiljandi. Ein samgonga, sum hongur saman við einari broyting um ríkisfelagsskapin, har meirlutin í verandi samgongu er fyri broyting eftir uppskoti tjóðveldisuppskotinum, men kontaktlimið er orði **kann** ístaðin fyri **skal** og so verður spurningurin, nær fólkaflokkurin vil halda seg til innanfyri hesa ordningina, ístaðin fyri at lýva upp til sítt trúvirði.

Sambært tí almennu skrivingini um álit ella misálit er greitt, at teir, sum sita uppá lántar sessar, fyri at brúka tykkara egnu vendingar, teir stungu høvdini saman, ikki fyri at forða suðuroyinginum Jákupi Joensen at koma í landsstýrið ella at blíva formaður í fíggjarnevndini, eftir uppskoti løgmans.

Teir stungu høvdini saman og harvið góvu teir sínum egna formanni og verandi løgmanni eina misálitsváttan.

Ju, sanniliga, her er neyðugt ikki við kyrringarfundi men við kyrringarfundum.

Sverre Midjord

Framsýning
Mánadag-fríggjadag 10-16
Leygardag-sunnudag 13-17

Føroya Fornminnissavn
Brekkutún 6
Hoyvík
Tlf 18076/10700

Føroya Oljuídnaður gjørt kanning av 40 fyritøkum:

Vinnan ikki klár til oljuvirksemi

Føroyskar fyritøkur hava ikki nakra orðaða strategi ella planlegging viðvíkjandi eini komandi oljuvinnu. Tær rokna við at skula luttaka í eini slíkari vinnu, men tær bíða fyri at vita, hvussu stórt virksemið verður

JAN MÜLLER

Meginparturin av fyritøkunum lýkur framleiðslukrøvini, ið oljuvinnan setir. Hetta er partur av niðurstøðu í eini kanning, sum Føroya Oljuídnaður hevur látið gera av tilsamans 40 fyritøkum í Føroyum.

Kanningin, sum verður nevnd „Kanning av føroysku vinnuni við atliti til eina komandi oljuvinnu", skuldi lýsa hvørja støðu føroysk virki og fyritøkur hava til eina komandi oljuvinnu. Greiða skuldi fáast á hvønn leiklut hesi virki og fyritøkur ynskja at hava í eini komandi oljuvinnu, og hvørjar fyrireikingar hesi virki hava gjørt ella ætla at gera fyri at røkka sett mál. Eisini skuldi kapasiteturin bæði viðvíkjandi manning og tólum lýsast. Somuleiðis skuldi kanningin lýsa, hvørki virki kunnu roknast at hava størst møguleikar at fáa tænastuveitingar og uppgávur fyri oljuvinnuna.

Tilsamans 40 fyritøkur eru við í kanningini, tær hava í miðal 40 starvsfólk, og tær arbeiða mest á heimamarknaðinum.

Flestu av fyritøkunum meta seg hava neyðuga kapasitetin at lúka framleiðslukrøvini, ein oljuvinna setir. Ein triðingur sigur seg mangla arbeiðsorku, og sætta hvør fyritøka vísir á manglandi vitan, framleiðsluútbúnað og høli. Tann vinnugreinin, sum sigur seg hava størst kapasitetsmangul, eru skipasmiðjur, handverk og mekanisk verkstøð.

Viðvíkjandi almennum tænastuveitingum sigur triðja hvør fyritøka, at mannagongdin við tollavgreiðslu er ikki nóg liðilig.

Kanningin gevur ikki fatan av, at fyritøkurnar hava nakra orðaða strategi ella planlegging viðvíkjandi oljuvinnu, heldur fær ein ta fatan, at fyritøkurnar bíða fyri at fáa skil á hvussu stórt virksemið verður. Tað merkir tó ikki, at fyritøkurnar ikki rokna við at skula luttaka í eini oljuvinnu. Hetta, sigur niðurstøðan, kann hava samband við, at Oljufyrisitingin enn ikki hevur givið ábendingar um, hvørji krøv verða sett til oljufeløg viðvíkjandi at nýta føroyskar fyritøkur sum undirleverandørar.

Annars meta flest allar fyritøkurnar, at oljuvinnan fer at hava týdning bæði fyri umsetingin og starvsfólkatalið. Flutningsfyritøkur siga, at tær stóru uppgávurnar verða í byrjanini, og at umsetningurin longu nú er øktur orsakað av oljuleitingini.

Arbeiðsbólkurin, sum gjørt hevur kanningina, mælir til at greiða fæst á, hvussu Føroya Oljuídnaður kann verða við til at veita upplýsingar og skapa fyri tiltøkum í sambandi við, at fyritøkurnar fyrireika seg til eina komandi oljuvinnu.

Í arbeiðsbólkinum hava sitið Jákup í Gerðinum frá Føroya Handsverksmeistarafelag, Sólus Gregersen frá KJ Hydraulik, Wilhelm Petersen frá Føroya Sparikassa og Jónfinn Simonsen frá Smyril Line.

Deyvafelag Føroya
Skrivstovan í Deyvahúsinum »Effata«, Íslandsvegur 10 B, er opin mánadag–fríggjadag kl. 9–13. Telefon 17597. Telefax 13609. Teksttelefon, ring 0032 og bið um 16929. Limafundur hvørt mánakvøld kl. 19–23.